

# LÆRLINGAR

***til handilin og til goymsluna í Idé Møblum***

Idé møblar sóknast eftir tveimum evnaríkum og miðvísum lærlingum, ið kundu hugsað sær útbúgving í okkara spennandi møblahúsi.

**Okkurt um teg**
Vit vænta av tær, at tú hevur handilsskúla-útbúgving og hevur hug at arbeiða í okkara spennandi møblahúsi. Tú hevur sjálvsálit, ert fyrikomandi og opin.

**Okkurt um okkum**
Vit bjóða eitt spennandi starv í einum nútímans møblahúsi, ið setir tænastuna í hásæti. Arbeiðsviðurskiftini eru góð við skiftandi arbeiðstíðum innan fyri eina vanliga arbeiðsviku. Uppi í lærutíðini er eisini skúlagongd á Handelsfagskolen í Odder.

**Umsókn**
Send eina stuttorðaða lýsing, merkt *lærlingur, handilin* ella *lærlingur, goymslan*, til okkara skjótast gjørligt. Vit hava brúk fyri tær at byrja sum skjótast, men vit bíða fegin eftir tí rætta.

**IDEmøblar**
**Uppi á Hálsi · Tel 35 46 80**

SANSIR 355 355



*Søkt verður eftir*

# Skipara/stýrimanni

**Starvið:**
Er innan offshore vinnu, herundir oljuvinnu, kápulvinnu o.a.

**Krøv og ábyrgd:**
Viðkomandi kemur at hava ábyrgd av, at formligu reglur á økinum, verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum skipsførari/skipari við STCW átekning
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið, ikki eldri enn 5 ár
- Roykkavara/sløkkileiðara skeið
- GMDSS skeið
- ARPA skeið
- Kunnleika til ISM og ISO 9000 góðskustýring

**Løn og setanartreytir:**
Verður sett eftir avtalu.

Umsóknin saman við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu verða okkum í hendi skjótast tilber.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til:
Gunnbjørn Joensen, stjóra, tel 422503 ella e-mail: gunnbjor@thor.fo
Ella Justin Philbrow, manning, tel 422503 ella e-mail: justin@thor.fo

**P/F THOR**
420 Hósvík
www.thor.fo

THOR

petur & petur • 320870

FO-420 Hósvík · Faroe Islands · Tel 422 503 · Fax 422 383 · www.thor.fo · thor@thor.fo

*P/F THOR, er eitt felag sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni, og annað virksemi í hesum sambandi, víst verður til heimasíðu okkara www.thor.fo*

Kappingarráðið

# Løgfrøðingur og Búskaparfrøðingur til skrivstovuna hjá Kappingarráðnum

Skrivstovan hjá Kappingarráðnum søkir við hesum eftir einum løgfrøðingi og einum búskaparfrøðingi at byrja sum skjótast. Uppgávan hjá Kappingarráðnum er at umsita løgtingslóg nr. 83 frá 6. juni 1997 um kapping, og frá 1. januar 2008 nýggju kappingarlógina: nr. 35 frá 3. mai 2007. Lógin hevur til endamáls, við virknari kapping, at fremja eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu til gagns fyri fyritøkur og brúkarar.

Við nýggju kappingarlógini fær føroyskt vinnulív somu karmar sum vinnan í grannalondunum. Hetta merkir, at fyrsta uppgávan hjá nýggju fulltrúunum verður at fyrireika vinnuna til hesar stóru broytingar.

## Búskaparfrøðingurin

Arbeiðið hjá búskaparfrøðinginum fevnur í høvuðsheitum um:
- at fyrireika mál til kappingarráðið
- at gera kanningar um kappingarviðurskifti
- at menna eftirlitsvirksemi
- at skriva frágreiðingar og vegleiðingar
- at tilevna reglugerðir og mannagongdir
- at menna búskaparfrøðiliga førleikan á kappingarlógarøkinum

## Løgfrøðingurin

Arbeiðið hjá løgfrøðinginum fevnur í høvuðsheitum um:
- at fyrireika mál til kappingarráðið
- at gera kanningar um kappingarviðurskifti
- at menna eftirlitsvirksemi
- at skriva frágreiðingar og vegleiðingar
- at tilevna reglugerðir og mannagongdir
- at menna løgfrøðiliga førleikan á kappingarlógarøkinum

## Førleikar

Vit vænta at tú hevur:
- viðkomandi samfelagsvísindaliga útbúgving frá hægri lærustovni. T.d. cand.jur, cand.merc.jur, cand.scient.pol, cand.oecon.
- góð analýtisk evni
- royndir innan privata ella almenna fyrisiting

Umsøkjarar skulu vera førir fyri at arbeiða sjálvstøðugt, og hava hegni til at samstarva og at arbeiða undir trýsti.

Harumframt kunnu verða líknandi uppgávur at loysa fyri Post- & Fjarskiftiseftirlitið, Tryggingareftirlitið og Skráseting Føroya.

## Skrivstovan hjá Kappingarráðnum bjóðar

Eitt sera fjølltáttað og sjálvstøðugt starv við avbjóðandi uppgávum, sum eru persónliga og yrkisliga mennandi, umframt møguleika fyri nógvum samskifti við norðurlendskar kappingarmyndugleikar og aðrar myndugleikar í Føroyum.

Vit kunnu bjóða góðar skeiðs- og eftirútbúgvingar-møguleikar, og luttøku á ráðstevnum innan kappingarlógarøkið.

## Setanartreytir

Setanartreytir verða eftir galdandi sáttmála við búðskapar- og lógfrøðingafelagið. Setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

Umsóknir, saman við prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast til:

Kappingarráðið
Skálatrøð 20
Postboks 73
FO-110 Tórshavn

og vera stovninum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin tann 31. august 2007 kl. 12.00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja Sigurðsson, deildarleiðara tlf. 35 60 41 ella Jógvan Thomsen, stjóra tlf. 35 60 21.

Skálatrøð 20 · Postboks 73 · F0-110 Tórshavn · Føroyar · Tel + (298) 35 60 40 · Fax + (298) 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo